## 40 ár við Gaddafi

Í gjár varð skipað fyri hátíðarhaldi ymsastaðni í Libya í sambandi við, at landsins leiðari, Moammar Gaddafi, hevur sitið við valdið í samfull 40 ár. Gaddafi var bara 27 ára gamal, tá hann setti seg í tann libyska forsetastólin tann 1. september í 1969, tá herurin gjørdi uppreistur ímóti kongi og sendi hann til Egyptalands í útlegd. Fleiri afrikanskir leiðarar vóru í høvuðsstaðnum Tripoli í gjár og heilsaði Gaddafi á 40 ára degnum, men teir vesturlendsku leiðararnir kundu teljast á einari hond.



## Færri stuðla krígnum

Amerikanska fólkið heldur lítið um kríggið í Afghanistan, og ein nýggj kanning hjá CNN vísir, at undirtøkan fyri krígnum hevur ongantíð verið so lítil sum nú. Í kanningini siga 57 prosent av teimum spurdu, at tey eru beinleiðis ímóti krígnum. 42 prosent taka harafturímóti undir við tí. Barack Obama, forseti, hevur lagt stóran dent á, at kríggið í Afghanistan hevur stóran týdning fyri amerikonsku trygdina. Men fólkið ivast. CNN-kanningin vísir, at 53 prosent av fólkinum styðja forsetan, men at tey flestu eru misnøgd við avrik hansara.

# Til Klaksvíkar heldur enn av landinum

**Fyri triðju ferð hava børn við likamligum menningartarni verið á serligum skeiði á Klaksvíkar Sjúkrahúsi**

HEILSUMÁL
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Í fjør varð farið undir eina royndarverkætlan, sum hevði til endamáls at kanna, um børn við skerdum likamligum førleika kunnu fáa tað sama burturúr í Føroyum, sum tey frammanundan høvdu fingið á viðgerðarmiðstøðum uttanlands, serliga í Svøríki og Skotlandi. Uppaftur onnur hava roynt aðrar viðgerðarhættir. Endamálið við tilboðnum í Klaksvík var at kanna, um arbeiðið kundi gerast bíligari í Føroyum, samstundis sum tað er ein stórur fyrimunur fyri foreldrini, at tey sleppa frá at fara av landinum við børnunum.

Avrátt varð, at royndarverkætlanin skuldi gerast á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Tað er sjúkrahúsið, sum samskipar karmarnar rundan um skeiðini í samráð við Almannastovuna, og nú havar tey júst havt tað triðja av fýra skeiðum, sum verkætlanin umfatar í fyrsta umfari.

Erla Nielsen, fysioterapeutur á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, sum er við í verkætlanini, sigur, at summi foreldur eru væl nøgd við tað, sum børnini fáa burturúr í Klaksvík, meðan onnur halda, at børnini fingu meiri burtur úr viðgerðini uttanlands. Sjálv heldur hon ikki, at tað er nakað løgið í tí, tí aðrastaðni so sum í Svøríki fáa børnini viðgerð á einari miðstøð, sum viðger júst slík børn. Harafturat er tað heldur ikki vist, at arbeiðið í Klaksvík er skorið eftir júst sama leisti sum aðrastaðni, sigur hon.

Hesaferð hava 10 børn verið á skeiði í Klaksvík, men onkuntíð hava tey verið 17 í tali.



*Erla Nielsen, fysioterapeutur og Andrea Udvardi Sabroe, »petøkonduktor« geva Valdimar Dalsgaard viðgerð*

*Mynd: Jóannes Poulsen*

Psykosa

Ein leikur eftir Sarah Kane

Verður framførdur
í samkomuhøllini á Landssjúkrahúsinum
12. - 27. september 2009

Sýningar dagar:

| | |
|---|---|
| ley. 12. sept. kl. 20 | sun. 20. sept. kl. 20 |
| sun. 13. sept. kl. 20 | |
| týs. 22. sept. kl. 20 | týs. 15. sept. kl. 20 |
| mik. 23. sept. kl. 20 | mik. 16. sept. kl. 20 |
| hós. 24. sept. kl. 20 | hós. 17. sept. kl. 20 |
| frí. 25. sept. kl. 20 | frí. 18. sept. kl. 20 |
| ley. 26. sept. kl. 20 | ley. 19. sept. kl. 20 |
| sun. 27. sept. kl. 20 | |

Atgongumermerkjasølan byrjar fríggjadag, 4. sept.
Agongumerki á 175 kr. fáast:
á netinum: www.ebillett.fo
á Kunningarstovuni, Vaglið, Tórshavn, tlf: 302425

NORDISKA apS
WWW.TVAZZ.COM

Stuðlar:

Mentamálaráðið FJØLRIT vodafone ATLANTIC AIRWAYS P/F Skrivarastova Tórshavnar kommuna Dansk-Færøsk Kulturfond norden Mentanargrunnur Landsins

# 130 lærugreinir til einar 3.000 næmingar

**Kvøldskúlin í Havn, sum er nógv tann størsti og fjølbroyttasti skúlin í landinum, byrjar sítt virksemið aftur nú síðst í september. Kvøldskúlin í Havn bjóðar fram sítt stóra úrval av lærugreinum á handaliga, listarliga og bókliga økinum.**

KVØLDSKÚLI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Útboðið er millum annað skeið at vera foreldur at tannáringum, Havnar søga, smíð fyri tvey ættarlið, motorlæra fyri kvinnur, fínari matgerð fyri menn og fleiri skeið í filmslist.

Av teimum umleið 130 lærugreinunum eru einar 30 nýggjar. Serstakt hetta skúlaárið er, at kvøldskúlin hevur fýra lærugreinir á HF-stigi: Støddfrøði á B-stigi, evnafrøði á C- og B-stigi og enskt sum kravd 2-ára lærugrein, ið endar á B-stigi.

Kvøldskúlin í Havn legði fyri í 1980´unum við 14 lærugreinum á HF-stigi, men tær vórðu allar spardar burtur. Henda sparingin stóðst av teirri ógvuliga meinsku 90´ara-kreppuni.

Seinasta skúlaár, 2008/9, vóru tilmeldaðir einir 3.100 næmingar við umleið 15.000 lisnum tímum.

Tær handaligu lærugreinirnar skúlaárið 2009/10 enda við framsýning í Kollafirði 21. mars og í Havn 27. og 28. mars 2010.

Faldarin við teirri víðfevndu skránni hjá Tórshavnar Kvøld-, Ungdóms- og Listaskúla 2009/10 verður borin í hvørt hús í Tórshavnar Kommunu í næstum. Faldarin er eisini á heimasíðuni, www.kvoldskulin.fo, og her kanst tú melda teg til. Harafturat stendur skráin í Dimmalætting og Sosialinum nú um vikuskiftið 4. og 5. september.

Lesið Sosialin -so eru tit við!